## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi, um kvøldið lot av ymsum ættum. Ælingur, partvís heglingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og sólglottar, men eisini ælingur, partvís kavi. Hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og norði og vátaslettings- ella kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum frostmarkið og +4 stig.

# Frumsýna Vakurleikadrotningin úr Leenane

SJÓNLEIKUR



Leygarkvøldið klokkan 19 frumsýnir leikhúsið GRÍMA 3. leikverk sítt í vetur.

Hetta er samstundis triðja frumsýningin í Havn í hesum mánaði.

Vakurleikadrotningin úr Leenane er eftir unga bretsk/írska høvundin Martin McDonagh (sami høvundi sum skrivaði »Krypilin úr Inishmaan« ið Gríma leikti á heysti 2000). Eitt sum sermerkir henda sera væl umtøkta høvund er, at hann við eirindaleysum bersøgni, humor og samhuga lýsir menniskju úr kjøti og blóði, sum vit eins væl kundu hitt á gøtuni. Kenna beinleiðis aftur úr okkara egna umhvørvi.

Á skræðuni vanlig hampafólk - men slatur og sleyg um hini eru samrøðuvitaminir, ið nøra um gerandislívið.

Longsul, vónir og dreymar hava lítlan og ongan áhuga. Brekini og veikleikarnir hjá hinum eru drívmegin og undirhaldið.

Hetta provokerar høvundan til at skriva sínar sermerktu leikir um hvat kann henda tá kenda mynstrið verður brotið. Tá ið trongleiki og ófrælsi gerst onkrum ovboðið og ógvusligar avleiðingar standast av hesum. McDonagh er ein sannur meistari í hesum kynstri, at snúgva hendingum eina leið ið áskoðarin minst hevði væntað.

Sýningar týs- miku- hós- og fríggjadagar kl. 20.00, leygardagar kl. 18.00 og sunnudagar kl. 16.00.

Gríma hoyrir mangan bæði úr Suðuroy og Sandoy fyrispurningar um hví vit ikki spæla t.d. kl. 16.00 sunnudag, so at møguleiki er hjá sjónleikaáhugaðum haðani at gera eina dagsferð til Havnar at síggja sjónleik og sleppa heimaftur sama dag.

Hetta fer nú at bera til tá sýningin sunnudag byrjar kl. 16.00 og endar kl. 18.00.

Í januar frumsýndi Gríma Føroyingasøgu við tveimum leikarum: Katarinu Nolsøe og Kristinu Hansen, leikstjørn Ria Tórgarð. Leikurin fekk góða móttøku. Eftir almennu sýningarnar í Havn, hevur leikurin verið sýndur á skúlum, í dagtilhaldi fyri eldri og til sertiltøk hjá ymiskum feløgum. Vitjað hevur higartil verið í Vágunum, í Eysturoynni og í Streymoynni.

Samstundis sýnir leikhúsið Vakurleikadrotningin úr Leenane nú og fyribils komandi 14 dagarnar, fram til dymbildagaviku.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷16 |
| Nuuk | ÷12 |
| Qaqortoq | ÷1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | ÷6 |
| Halifax | ÷5 |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 12 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 9 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | 5 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 13 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 12 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 18 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 10 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 0 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 977 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing eystan og brúgvalagið til Føroya fer í landnyrðing.




Lágtrýstið millum Íslands og Føroya stendur mestsum í stað og sunnan fyri lágtrýstið rekur køld og óstøðug luft móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/03 kl. 06⁰⁰– 18/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,6°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,6 mm – mált frá 17/03 kl. 06⁰⁰–18/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 60,0 mm





BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

12. mars: Mánin næstur jørðini
13. mars: Seinna kvarter
20. mars: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmannasundi fp. | Vestmannasundi sp. | Mykinesfirði fp. | Mykinesfirði sp. | Nólsoyarfirði fp. | Nólsoyarfirði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvannasundi fp. | Hvannasundi sp. | Fugloyarfirði fp. | Fugloyarfirði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. mar | 05.27 | 17.50 | 04.27 | 16.50 | 04.42 | 17.05 | 07.27 | 19.50 | 08.27 | 20.50 | 03.42 | 16.05 | 02.42 | 15.05 | 05.42 | 18.05 | 06.42 | 19.05 | 05.12 | 17.35 | 06.27 | 18.50 |
| 20. mar | 06.12 | 18.33 | 05.12 | 17.33 | 05.27 | 17.48 | 08.12 | 20.33 | 09.12 | 21.33 | 04.27 | 16.48 | 03.27 | 15.48 | 06.27 | 18.48 | 07.27 | 19.48 | 05.57 | 18.18 | 07.12 | 19.33 |
| 21. mar | 06.54 | 19.16 | 05.54 | 18.16 | 06.09 | 18.31 | 08.54 | 21.16 | 09.54 | 22.16 | 05.09 | 17.31 | 04.09 | 16.31 | 07.09 | 19.31 | 08.09 | 20.31 | 06.39 | 19.01 | 07.54 | 20.16 |
| 22. mar | 07.37 | 19.58 | 06.37 | 18.58 | 06.52 | 19.13 | 09.37 | 21.58 | 10.37 | 22.58 | 05.52 | 18.13 | 04.52 | 17.13 | 07.52 | 20.13 | 08.52 | 21.13 | 07.22 | 19.43 | 08.37 | 20.58 |

5 707265 100050 >